Dan'skar duldir*)

(Sos. 27.4.1989)

*) Orðið *duld* hevur Chr. Matras tikið upp ur íslendskum. Merkingin er 'hugfloykja' (sí Jørgen-Frantz Jacobsen: Tíðargreinir (1976), bls. 5).

Ilskur maður og ógvorðaður, Dan Petersen. Griskur er hann eisini á at líta, har hann situr á myndini, hendurnar kneptar og knyklar í bryr, ikki óátøkur einum ajatolla. Eingin »fundamentalistur« kortini. Nei, at døma eftir orðunum, ið randa myndina, er har einki »fundament«, einki støði. Alt hansara fjákuta møsn er grundað á kyksendi. Løgið, at so vandið blað sum Sosialurin nennir at fylla tveir partar úr blaðsíðu við tilikum meinskum og særandi svassi. Ella er tað ætlanin at halda sortupottin í heilum undir kóki, so at lesarin altið skal hava okkurt forkunnugt at svala sína gølutrá við? Hetta er ivaleyst kærkomið tilfar, tí kappingin við skarnbløðini er hørð. Eydnast tað so at fáa hin álopna at svara aftur, er spælið vunnið (bingo!).

Tað er ovgóð æra at svara til sovorðið, men eg fái ikki tagt til so grov álop á frændatjóð, sum í so mongum hevur roynst okkum holl. Hvat ilt hava íslendingar gjørt okkum ella lokkað okkum til, at tað altið skal verða klikt í teir av summum føroyingum. Og so hetta æviga heimfødda svarvið um, at teir skulu vera avbyrgdir frá umheiminum, tí at teir eru ikki so fimir í donskum. Man Dan, ið hevur ferðast í Íslandi hesi seinastu 25 árini, nakrantið hava hugt inn í ein íslendskan bókahandil? Har hevði hann varnast, at umframt tað ørgrynni av alskyns upprunaligum íslendskum bókmentum, ið prýðir hillarnar úr gólvi undir loft, er umboðað tað besta av heimsbókmentunum, frá hinum elstu klassisku høvundunum til teir nýggjastu nýggju úr øllum ættum. Heldur ikki trýtur lættur lesnaður, bæði innlendskur og týddur. Soleiðis kann tann íslendingur, ið ikki hevur hug ella høvi til at læra onnur mál, fáa sín kunnleikatosa stillaðan á sínum egna máli, eins og fjøldin í stórtjóðum. Men eru teir so sørir við tungumálakunnleika, sum Dan vil vera við, tá ið teir tó hava fingið í lag at týða alt hetta til sítt mál? Einki útlendskt sjónvarpstilfar verður sýnt, uttan at tað hevur fingið íslendskan undirtekst ella íslendska talu. Tað er eisini kravt, at øll sjónbond, ið verða útleigað, hava íslendskan tekst. — Eisini teir høvundar, sum Dan nevnir, eru týddir til íslendskt. (Hvussu væl er Dan annars lisin í bókum teirra, tá ið hann ikki er førur fyri at endurgeva øll nøvn teirra rætt — »Ipsen«, »Bøjer« og Lo »Johansen«!)

Nei, tann avbyrging, ið skaðiligari er, er avbyrging frá sjálvum sær, sini egnu tungu og menningini. Urslitið verður rótloysi.

Hvør smároynd at væla um okkara egið mál verður tikin við stálhandskum av Danni og hansara likum. Siggja teir føroyskt orð, sum teir ikki komast við í stundini, so rúka teir í blekkhúsið at sprutta um íslendskt og tað, sum verri er. Teir hava ikki bindini til at gloppa eina føroyska orðabók ella hugsa seg eitt sindur um, fyrr enn teir hava loypt gallið úr sær. Men orðum úr tí, sum teir kalla altjóðamál (hvat er tað annars? Esperanto, ella hvat?), teimum gloypa teir hálvráum við góðan hug, sama um teir fata tey ella ikki. Teir, sum tala »altjóðamál« skulu sleppa at smíða orð, sum teimum lystir, men Guð náði tann føroying, sum vágar sær at skjóta upp føroyskt orð fyri nýggjum hugtøki. Hann verður við brestin skírdur óbótamaður, sum vil køva alt danskt og steingja okkum úti frá heimsmentanini.

Nei, Dan, tú ert ikki maður fyri at sverta íslendingar. Fleiri av teimum høvundum, tú nevnir við so miklari virðing, og tað av røttum, standa í stórari takkarskuld til tað mentanaravrik, ið tann fátæka men andliga ríka tjóð hevur framt við at skapa og varða um bókmentir so dýrmætar, at allur heimurin hámetir tær.

Tú ert málførari í framhaldsdeild, stendur undir myndini, men ikki kanst tú vera væl at tær í mál- og mentasøgu okkara, tá ið tú fært teg til at seta hesi sneiðorð niður á tað alt ov tolna pappirið: »Lagnuløta fyri mál og mentan okkara, tá ið onkur fór við íslandstrolara fyri 30 árum síðani«. Nei, Dan, tað er væl longri síðan enn so, at húgsandi føroyingar sóu, at vit høvdu nógv at læra av hesi mentaðu skyldtjóð. Nøvn sum Jens Chr. Svabo, Jákup Nolsøe, V.U. Hammershaimb, Friðrikur Petersen (sum hevur ríkað føroyskt við nógvum orðum úr íslendskum, eitt nú *lag* í merkingini »melodia«), Jakob Jakobsen, Jóannes Patursson, A. C. Evensen, Símun av Skarði, Rasmus Rasmussen og Chr. Matras siga tær kanska ikki einki? Ella?

Tað er ikki svínum líkt, ið sínum er líkt. Allir hesir omanfyri nevndu, og nógv fleiri við, hava sæð tað sjálvsagda í tí, at vit hava havt nakað av íslendingum at læra málsliga, og hvi ikki viðurkenna tað við takksemi í staðin fyri altíð at vera við tí ringa orðinum afturímóti? Tú skrivar annars so vakurt um at »bróta niður mark«.

Á ferðum tínum í Íslandi hesi seinastu 25 árini ert tú vorðin »greiður yvir (»klar over«?), at íslendska mentanin er nógv minni upprunalig enn tann føroyska«. Tú skyldar lesarum tínum, at tú ikki liggur oman á hesum forvitnisligu rannsóknarúrslitum, men leggur tey fram í komandi greinum ella bókverki. Teir munnu bíða ótolnir.

Hesin óttin fyri íslendska vandanum, ið pinir so mangan føroying, átti at verið tikin upp til greiningar av sálarfrøðingum, tí hann tykist mest av øllum sjúkligur. Í innganginum at ljósprentaðu útgávuni av Føringatíðindum (1969), tekur Chr. Matras soleiðis til: »Ræðslan fyri, at tað vit skriva, er íslendskt, er gomul sjúka í Føroyum. Tá ið Pløyen amtmaður sá handrit sítt av »Færøiske Trylleformularer« — handrit eftir uppskrift hjá Ola Jespersen skulameistara — prentað við rættskriving Hammershaimbs (Annaler for nordisk Oldkyndighed, 1846), ilskaðist hann um, at tað var latið í íslendskan búna. Nú var Pløyen dani, men eg ivist ikki í, at onkur føroyingur, sum las tíðaritið, helt sum hann. Ræðslan fyri tí »íslendska« sniðinum í skriftbúnanum man nú vera linkað yvirhøvur, men ræðslan fyri, at okkurt í orðavali líkist ov nógv íslendskum, er ikki meira dovnað enn so, at lítið skal til at fáa hana at kykna upp aftur, um onkur hevur hug at ørkymla hetta sárið«.

Tú grætur rossatár um, at ein skyldmaður mín, ið hevur búð í Danmørk meginpartin av ævi síni, skilur ikki føroyskt longur. Hevur hann tikið soleiðis til, er tað besta prógv um, at føroyskt er livandi mál í menning og stendur ikki í stað, men broytist alsamt, sum samfelag í støðugari broyting krevur tað. Tað er ikki at vænta, at maður í útisetu, sum ikki hevur dagligt samband heim, skal kunna fylgja við øllum málsligum nýhendingum. Nakað soleiðis man hann hava meint. Kenni eg hann rætt, man hann heldur hava fegnast um, at føroyskt eigur í sær stimbur til at ganga fram sum sjálvstøðugt norrønt mál, sum tó ikki er so stórt í sær sjálvum, at tað vil ikki taka við lærdómi frá góðum grannum, annaðhvørt teir eru fyri eystan ella vestan.

Málsligu atfinningar tínar er ikki ómakin vert at svara til, tí einki hald er í nakrari teirra. Skal bert at enda bera upp gátu: — Fult, tá ið hvølvir, tómt, tá ið stendur. Git mær tað!

Royn at hugsa teg eitt lítið sindur betur um, áðrenn tú næstu ferð fellir tínar eirindaleysu »ajatolsku« dómar um krotusmíð og neyðtøku.

Um »Hvølvus« kanst tú annars orða við Oskar Hermannsson — tað navnið er av hansara stíðja.

Johan Hendrik W. Poulsen

O, móðurmál, stórt er títt fall

sjónarmið

— Tað mál, sum hevur lívið á munnunum í eitt av tí fámennasta lond í heimi, er ikki lættvirkt longur. Íslendin hava tað fingið sítt konstruerað fremmandamál, sum engin kenslur í tí, skrivar Dan Petersen m.a. í sjónarmiði í dag.

Dan Petersen er fyrilesingur og lærari við Rasmusar Skóla. Hann undirvísir í fremmandamálinum í donskum og føroyskum.

sjónarmið

Danskur listamaður í SMS

Mikudagin læt danski listamaðurin Ole Olsen upp listaframsýning í SMS. Framsýningin er á aðru hædd beint við Dvøljuna. Opið er til sunnudagin.

Framhald av síðu 9

søk vorðið til destruktivar mekanismur, sum í forhond hava tikið burtur, og taka burtur, grundarlagið fyri tí lønsemi, ið alt og øll hava fyri neyðini — tosa og søknast eftir. Meginparturin av tí fiski, ið vanliga var ryggskaddur (og soleiðis var farin at bløða inneftir undir vanligari tóging) er nú vaksin í so stóran mun, at búskaparliga støða landsins er hættislig.

Stigvisa umleggingin í mátanum at nýta togaraflotan uppá — frá einkulttogara til pør — fyri ikki at tala um nýbygningar fyri nógvar 10-tals milliónir, gangað við tvey, til hetta sama endamál, hevur ført til, at samlaða skipatalið við árslok 1988 er vorðið 52 skip, **ella hundrað og fýra partogarahal um samdøgrið,og hetta hevur ført við sær, at Flakavirkið Føroyar, sum í 1987 seldi fyri 967 mió., kundi notera eina niðurgongd, stóra umleið 70 mill. kr., ikki sum eina fylgju av fallandi marknaðarprisum, men tvørturímóti einamest sum eina fylgju av fallandi marknaðarprisum fyri eitt vøruútboð á fallandi støði til dygd, og sum eina sjálvfylgju av hesum, fallandi marknaðarprisum.**

Broyta vit mistakið og rokna lønsemi sum eina konsekvens av maximalum endavirði, so vinna vit ikki bara 50%, men nógv meira enn tað.

John Smith